# Tíðin gongur ov skjótt

## VEÐRIÐ




**Veðrið í dag**
Lot til andøvsgul av suðuri, 3-8 m/s. Sum frálíður hækkar hann í ein landssynning, og andøvsgul til strúk í vindi, 8-13 m/s. Skýggjað og turt fyri tað mesta. Hitin um 8 og 13 stig.




**Veðrið hósdagin**
Andøvsgul til strúkur í vindi av landssynningi, 8-13 m/s. Sum frálíður minkar hann vindin í gul til stívt andøvsgul, 5-10 m/s. Skýggja fyri tað mesta og kanska okkurt ælið. Hitin millum 8 og 13 stig.




**Veðrið fríggjadagin**
Gul til stívt andøvsgul av landssynningi, 5-10 m/s. Skýggjað og ælaveður. Men sólin sær kanska út á dagin. Hitin millum 8 og 13 stig.

Fyri nøkrum døgum síðani var kendur danskur sjónvarpslækni og vitjaði í Føroyum. Peter Qvortrup Geisling legði leiðina framvið Miðlahúsinum í Vágsbotni. Á myndini sæst hann inni á redaktiónini við fundarborðið.

Peter Qvortrup Geisling var komin til klettarnar fyri at halda fyrilestrar um strongd og arbeiði á ymsum føroyskum fyritøkum.

Sjónvarpslæknin er altíð góður fyri eina viðmerking. Við Sosialin tann 22. juni segði læknin, at tað skuldu verið fleiri hemoridir í bløðunum. Geisling heldur við hesum, at fjølmiðlarnir umrøða ikki í nóg stóran mun heilsu og sjúkur.

Geisling tosar eisini um javnstøðu. Við BT tann 24. juni sigur læknin, at innast inni í hjartanum heldur hann, at vit eru fødd fullkomiliga líka.

- So tað at vit yvirhøvur kjakast um javnstøðu, er sum at kjakast um rasumismun. Tað er ein fullkomiliga sjúkur spurningur, sum bara skal ruddast av vegnum sum skjótast, sigur Peter Qvortrup Geisling við BT.

Sjónvarpslæknin visti ikki at siga, nær hann næstu ferð kemur til Føroyar. Men hann sigur, at Føroyar saman við Skagen eru tey støðini í heiminum, har tíðin gongur ov skjótt.

**-hkm**



*Peter Qvortrup Geisling frá »Lægens bord« her við eitt annað borð, redaktiónsborðið í Miðlahúsinum í Vágsbotni*
*Mynd: Bárður*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 9 |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 15 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 19 |
| London | 22 |
| Tromsø | 10 |
| Bergen | 11 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 22 |
| Warzawa | 23 |
| Kiev | 21 |
| Bukarest | 22 |
| Paris | 30 |
| Madrid | 33 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 32 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 34 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 28 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 15 |
| New York | 23 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | 33 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 18 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Ein hátrýstryggur yvir Føroyum ferðast fram við Føroyum. Eitt minni látrýst norðan fyri Ísland flytur seg eystureftir, og eitt annað látrýst í landsynningshorninum av Grønlandi dýpist og stendur í stað.



Ein tilhoyrandi kuldabrúgv flytur seg týsdagin suður um Ísland, og lýggj og slavin luft kemur yvir Føroyar av vesturi og útsynningini. Mikudagin verður kuldabrúgvin vestan fyri Føroyar og nærkast. Samstundis ferðast eitt látrýst úr Írlandi móti Íslandi.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 27/6 kl. 06[00]– 28/6. 06[00]. Hitin í gjár: 10,9°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° - Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,3 mm – mált frá 27/6 kl. 06[00]– 28/6 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juni: 71,3 mm

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

Sosialurin

## VESTFALLSKYRRINDI

23. juni – Mánin næst jørðini
28. juni – Seinna kvarter
6. juli – Tendring
8. juli – Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 29. Juni | 01.50 | 14.26 | 00.50 | 13.26 | 01.05 | 13.41 | 03.50 | 16.26 | 04.50 | 17.26 | 00.05 | 12.41 | 11.41 | - | 02.05 | 14.41 | 03.05 | 15.41 | 01.35 | 14.11 | 02.50 | 15.26 |
| 30. Juni | 02.48 | 15.11 | 01.48 | 14.11 | 02.03 | 14.26 | 04.48 | 17.11 | 05.48 | 18.11 | 01.03 | 13.26 | 00.03 | 12.26 | 03.03 | 15.26 | 04.03 | 16.26 | 02.33 | 14.56 | 03.48 | 16.11 |
| 1. juli | 03.30 | 15.56 | 02.30 | 14.56 | 02.45 | 15.11 | 05.30 | 17.56 | 06.30 | 18.56 | 01.45 | 14.11 | 00.45 | 13.11 | 03.45 | 16.11 | 04.45 | 17.11 | 03.15 | 15.41 | 04.30 | 16.56 |
| 2. Juli | 04.18 | 16.41 | 03.18 | 15.41 | 03.33 | 15.56 | 06.18 | 18.41 | 07.18 | 19.41 | 02.33 | 14.56 | 01.33 | 13.56 | 04.33 | 16.56 | 05.33 | 17.56 | 04.03 | 16.26 | 05.18 | 17.41 |
| 3. Juli | 05.04 | 17.28 | 04.04 | 16.28 | 04.19 | 16.43 | 07.04 | 19.28 | 08.04 | 20.28 | 03.19 | 15.43 | 02.19 | 14.43 | 05.19 | 17.43 | 06.19 | 18.43 | 04.49 | 17.13 | 06.04 | 18.28 |

5 707265 100036 >